


# Anna á Steinum gjørdist bert 21 ár

**Ofta verður sagt, at á einum kirkjugarði finnast fólk í øllum aldrum. Men hetta er sjálvsagt enn meira galdandi fyri ein gamlan kirkjugarð, har tey ungu ofta hava yvirvág**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Í 1924 doyr tann bert 21 ára gamla Anna Poulsen av Velbastað, og hon verður jarðað í gamla kirkjugarði. So syrgiligar vóru tíðirnar tá, at hon var jarðað millum fleiri av sínum javnaldrum.

Tað eru 41 fólk jarðað í kirkjugarðinum í 1924. Aldurin settur á 28 teirra. Tølini vísa, at fýra teirra eru upp til 9 ára gomul, seks upp til 19 ára gomul, 12 upp til 29 ára gomul, 16 upp til 49 ára gomul og 23 upp til 69 ára gomul. Av hesum 28 eru bert fimm, sum er 70 ár og eldri.

Um Onnu vita vit ikki so nógv. Skúli er bygdur á Velbastað í 1905. Sjálv er hon født í 1902, so her hevur hon gingið í skúla. Anna er helst farin í skúla í 1909. Bette Simonsen á Teigum var hennara fyrsti lærari. Í 1910-12 var Julianna Petersen av Húsum, lærari, 1913-15 var tað tann kendi sjálvstýrispolitikkarin Louis Zachariassen, og frá 1915 til 1918 var Eirikur Eliassen av Kirkju lærari.

Anna verður konfirmerað í Havn 3. oktober 1915 saman við gott 30 øðrum konfirmantum. Ein av teimum var rithøvundurin Jørgen Frants Jacobsen. Tá var tað eitt sindur ymiskt, um genturnar vóru í svørtum ella hvítum kjólum, men Anna var so í hvítum kjóla.

Ættin veit ikki nógv um Onnu, uttan at hon doyði av landfarssótt. Tað er tó tað løgna, at sambært amtslæknafrágreiðing fyri 1924, gekk eingin deyðilig landfarssótt í 1924. Tað gekk tó ein influensa í tveimum umførum. Tann fyrra kom í hæddina í apríl við um 500 sjúklingum. Hetta kann væl hóska við, at Anna er deyð seinast í apríl. Influensan gekk bert í Norðoyggjum og Suðuroy.

Tey í ættini vita, at Anna fór til Suðuroyar at ferðast saman við eini vinkonu. Tá er tað, at influensan gongur har. Tær báðar koma norður aftur, og fara í karantenu, sum ofta varð gjørt, tá slíkt gekk. Anna verður sjúk og doyr, meðan vinkonan ikki er smittað.

Borghild, systir hennara, fortaldi, at hon minnist systir sína fara niðan Bøllubrekku á veg til Havnar av Velbastað at fara í karatenu, og hon sá hana ikki aftur.

Eingin mátti heldur koma til hana orsakað av ræðsluna fyri smittu. Hon hevur tískil verið frísk fyrstu dagarnar, er so blivin sjúk og er so deyð.


*Anna gjørdist bert 21 ára gomul*

Anna er so jarðað í Havn, kanska eisini í ræðslu fyri smittuvanda. Annars vórðu fólk á Velbastað jarðað í Kirkjubø.

Her kann skoytast uppí, at tað vóru ikki færri enn 40, sum doyðu av tuberklum hetta árið. Afturat hesum komu allar skipsvanlukkurnar hetta árið. Hetta hevur verið ein syrgilig tíð.

**Ættað av Steinum**

Anna var ættað av Steinum. Pápi hennara var Dánjal Poulsen (1866-1938), ættaður úr Sakrastovu í Hesti. Hann tók við garðinum, tí eingin var at taka við festinum í ættini, sum var á garðinum.

Dánjal var beiggi Hans í Sakrastovu, sum saman við soninum Johannes Paula gekk burtur við fyrra bátinum tann stóra skaðadagin í Hest í 1919, sum Ingibjørg Hansen úr Hesti fyri kortum greiddi frá í Miðvikuni.

Beiggi Dánjal, Poul í Sakrastovu, fekk eisini ein dramatiskan deyða. Hetta var tann 2. juni 1894, tá hann sjálvur fimti fóru út um oynna at fleyga lunda. Hesum greiðir Jóan Kristian Poulsen frá í Hestsøgu.

Fýra fóru uppá land, og ein var eftir í bátinum. Uppgongdin var sera ring, og har tað var ringast, máttu teir høgga sær spor. Poul var av allarraskastu bjargamonnum og sigur við hinar: "Tað skulu tit minnast til, at hetta eru tey ringastu spor, ið eg havi stigið." Tá ið teir eru komnir upp á skrædnar bergið, og tað fer at leypa. Poul og ein annar fara til sjós.

Dagin eftir fara teir at leita eftir líkunum vitandi, at vandi kundu vera fyri nýggjum lopum. Tað eydnaðist at bjarga líkini, men beint eftir leyp aftur.

Mamma Onnu var Susanna Katrina f.Dalsgaard (1868-1967) úr Skálavík. Anna átti 10 systkin, og tey vóru:

**Poul Dion** (1895-1971), sum tók við festinum. Hann var giftur við Mariu Müller (1898-1944) úr Kvívík. Tey fingu tvey børn.

**Hans Olavus** (1897-1983). Giftist við Katrinu Malenu Dalsgaard (1898-1967) úr Gerðinum í Skálavík. Hann var timburmaður, og tey vóru búsitandi í Havn. Tey fingu trý børn.

**Jóannes** (1898-1967). Var ógiftur og búði á Velbastað. Jóannes var skiparalærdur og førdi Hero í 1927. Annars sigldi hann sum bestimaður og maður, til hann vegna sjúku legðist uppi. Jóannes las nógv, var vitugur og sera skemtingarsamur. Sagt var, at hann var millum tey, ið læntu flest bøkur av landsbókasavninum.

**Vilmund** (1900-93). Giftist við Hannu Jacobsen (Tórgarð) (1902-1999) úr Havn. Vilmund arbeiddi við at stoypa hús, inntil hann varð grótlagari burturav. Tey fingu tvær døtur.

**Astrid** (1904-1991). Hon var smyrjibreyðsjomfrú, arbeiddi eina tíð í Danmark og seinnu árini á Hafnia í Havn. Ógift.



ANNA KATRINA SOFÍA
POULSEN
VELBASTAÐ
FØDD 25. AUGUST 1902
DOYÐI 2. MAI 1924
EG LIVI

**Gunnhild** (1905-99). Gift við Johannes Dalsgaard (1893-1991), bónda í Dalsgarði í Skálavík. Tey vóru barnleys.

**Niels Pauli** (1908-1985) fekk sær eftirnavnið av Steinum. Hann var bóndi á Heyggi í Kollafirði og giftist við Jensiu Clementsen (1912-82) av Sandi. Tey fingu seks børn.

**Helfred** (1909-2002). Giftist í 1933 við Jógvan Heinesen (1900-89) á Viðareiði. Tey fingu fýra børn.

**Thorvald** (1912-99). Thorvald var búsitandi í Havn, har hann hevði urtagarðsbrúk. Við testamenti stovnaði hann Grunn Thorvald Poulsens av Steinum ungum listafólki at frama. Her verður býtt út á hvørjum ári.

**Borghild** (1914-99). Gift við Olrik Christiansen (1913-94) frá Gjógv. Tey vóru barnleys, men ættleiddu eina gentu.

Ein týðandi kelda til hesa grein er bókin Fólk og hús á Velbastað, skrivað av Leon Andreassen. Hann doyði bert 56 ára gamal í 2001. Leon var eitt skilafólk og ein fróðarmaður. Tað var spell, at hann ikki fekk gjørt meira við hesa søgu.


*Dánjal á Steinum, pápi Onnu*


*Á Steinum, haðani Anna var ættað, skúlin og fremst til høgru, undir Gørðum*


*Brøður Onnu, Vilmund og Jóannes*

**Komandi partur**

Komandi hósdag verður greitt frá Fridu Samuelsen, sum bert gjørdist 13 ára gomul. Omma hennara Inga í Króki var millum fyrstu føroysku konufólkini "til lands" í Íslandi. Tann ókendi maðurin á myndini í seinasta parti var Hans Jacob Simonsen, sonur Onnu Katrinu og Johannes Simonsen